# Listaframsýningar á Strondum og Fuglafirði



*Í dag, flaggdagin, letur listaframsýning upp í Ribarhúsi í Fuglafirði, og sunnudagin verður framsýning í bygdahúsinum á Strondum.*
*Tað eru næmingar á kvøldskúlunum í Fuglafirði og á Strondum, sum sýna fram*

**Tað er Jóannes S. Hansen í Saltangará, sum hevur verið lærari á kvøldskúlaskeiðunum á Strondum og í Fuglafirði.**
**- Tað er krevjandi at undirvísa í list. Neyðugt er at vera vakin – tó uttan at "yvirstýra" næmingunum, sigur hann**

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*

**Strendur/Fuglafjørður:** Tvær listaframsýningar verða í Eysturoynni hetta vikuskiftið.

Tað eru næmingar, sum hava gingið á kvøldskúla í málingalist á Strondum og í Fuglafirði í vetur, sum fara at sýna fram.

Tey, sum hava gingið í bygdahúsinum á Strondum, sýna fram í bygdahúsinum sunnudagin komandi. Á Strondum verður bert opið hendan eina dagin, nevniliga millum kl. 15 og 19.

Tey, sum hava gingið á kvøldskúla í Fuglafirði, sýna fram í Ribarhúsi.

Hendan framsýningin letur upp í dag og verður opin í nakrar dagar.

Næmingarnir í Fuglafirði hava málað í ítróttarhúsinum, sum er við fótbóltsvøllin.

## Krevjandi frálæra

Tað er Jóannes S. Hansen í Saltangará, sum hevur verið lærari á skeiðunum á Strondum og í Fuglafirði.

Hann hevur undirvíst á kvøldskúlum í málingalist í eini 15 ár, eisini á Glyvrum, men ongantíð í trimum støðum í senn.

- Eg haldi, at tvey kvøld um vikuna er nóg mikið - fyri ikki at siga ov nógv. Tað er krevjandi at undirvísa í list. Neyðugt er at vera vakin, samstundis sum tú ikki eigur at "yvirstýra" næmingunum, tá ið tey arbeiða, sigur Jóannes.

At undirvísa í list, heldur Jóannes, er at geva av tí "yvirskoti", tú hevur.

- Tað eru jú so mong, sum liggja á tí latu síðuni og bara gera tað í síni frítíð, sum tey sjálvi hava hug til.

Hann vísir á, at tað kann vera eitt tak at skula út tvær ferðir um vikuna, ávikavist yvir á Strendur og til Fuglafjarðar um vetrarnar.

- Hetta er jú ikki beint við dyrnar. Men vegirnir eru góðir, og tað lættir um koyringina. Kavafannir eru tó sjáldsamar á vegunum um vetrarnar longur, sigur hann.

## 750 málningar

Jóannes S. Hansen metir, at næmingarnir, hann hevur havt hesi árini, munnu hava málað einar 50 málningar hvønn veturin í einar 15 vetrar tilsamans.

- Tað merkir, at einir 750 málningar eru málaðir á kvøldskúlanum hesi árini. Hesir málningar hanga uppi ymsastaðni og munnu hava verið til gleði fyri mong, sigur hann at enda.



*Í dag kl. 15 verður høvi hjá fólki at fara til flaggdagshald á torginum í Saltangará*

# Flaggdagshald á torginum í Saltangará

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*

**Saltangará:** Í dag, 25. apríl kl. 15, verður flaggdagshald á torginum við býráðshúsið í Saltangará.

Skótar og ítróttarfólk fara at ganga skrúgongu, og Nes sóknar Musikkfelag spælir.

Flaggdagsrøðuna í ár heldur Randi Vang.

# Stongsulin í Kanada dýrur fyri rækjuskipini

**- Tað kostar okkum góðar 5 milj. krónur um árið at sigla heim til Føroya við lastini, sigur Petur Jacobsen, stjóri á P/F Ísborg**

RÆKJUFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*



*- Vit skríggja ikki eftir stuðli, men vit skríggja eftir, at okkara politikarar loysa trupulleikan, soleiðis at vit sleppa innaftur í Kanada at landa, sigur stjórin á P/F Ísborg, Petur Jacobsen*

- Vit tosa als ikki um stuðul til rækjuflotan, sum politikararnir alla tíðina goyma seg aftanfyri. Vit tosa um at fáa myndugleikarnar at loysa trupulleikan millum Føroyar og Ný Foundland, soleiðis at vit sleppa innaftur í Ný Foundland at landa.

Hetta sigur stjórin á P/F Ísborg, Petur Jacobsen, í viðmerking til skrivingina um politiskt at hjálpa rækjuflotanum burtur úr fíggjarligu kreppuni.

## Góðar 5 milj. kr

- Eg havi roknað meg fram til, at reiðaríið hjá okkum missir stívliga 5 milj. krónur um árið við at sigla heim til Føroya við lastini í staðin fyri – sum áður – at leggja veiðina upp í Ný Foundlandi.

Petur heldur ikki, at politikararnir hava skilt boðskapin hjá rækjuflotanum.

- Vit skríggja ikki eftir stuðli, men vit skríggja eftir, at okkara politikarar loysa trupulleikan við stongslinum at landa í Kanada.

## Er ótrúligt

Stjórin á P/F Ísborg sigur, at Føroyar er einasta land, sum ikki sleppur inn í kanadiska havn at landa. Øll hini londini hava fingið hesi viðurskifti uppá pláss, eisini íslendska stjórnin.

- Tað er so galið, sigur Petur Jacobsen, at íslendingar trúgva okkum ikki, tá ið vit siga, at vit enn ikki sleppa inn at landa í Kanada.

Sosialurin spurdi eisini Jacob Vestergaard, landsstýrismann í fiskivinnumálum, um nakað ítøkiligt er hent í hesum máli seinastu dagarnar, men so er ikki.

Tískil heldur stongsulin móti føroyskum fiskiskipum í Kanada, sum nú hevur vart í meira enn eitt ár, fram.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jákup O. Olsen 65 ár



Mikudagin 23. apríl fylti Jákup O. Olsen í Vági 65 ár. Jákup er úr Vági, hann er sonur Mariu, f. Midjord, av Økrum og Martin Karl Olsen úr Vági. Hann tók prógv sum lærari á Nr. Nissum seminarium í 1962 og var lærari í Thyborøn frá 1962-63 og í Vági frá 1963 til 1991, har hann var skúlastjóri frá 1972-91. Hann var býráðslimur í Vági frá 1980-2000 og sat sum tingmaður fyri Kristiliga Fólkaflokkin og Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk frá 1994 til 1998. Jákup er giftur við Marnu, f. Holm, úr Vági.

## Rúna Sivertsen formaður í RFF



Á ársaðalfundi í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, mikudagin 23. apríl, legði formaðurin, Petur Jacob Sigvardsen, frá sær. Nýggjur formaðurin er Rúna Sivertsen í Klaksvík. Rúna, ið er 47 ára gomul, er fødd og uppvaksin í Klaksvík, hon er dóttir Hansu og Benjamin Joensen (Benni). Rúna er gift við Birgir Sivertsen í Klaksvík og eiga tey 5 børn. Hon arbeiddi á prentsmiðju frá 1973-75, var sjálvstøðug vinnurekandi frá 1977-81, arbeiddi í klædnahandli frá 1986-89 og var heimahjálp frá 1992-96. Í 1994 stillaði hon upp fyri Fólkaflokkin í Norðoya valdømi, og frá 1996-2002 var hon varamaður hjá Anfinni Kallsberg á tingi. Hon sat í skúlanevndini fyri skúlarnar í Klaksvík frá 1988-2000 og í stýrinum fyri Klaksvíkar Sjúkrahús frá 1995-96. Hon er í dag formaður í ráðnum fyri Klaksvíkar Sjúkrahús. Síðan Rúna fór úr tinginum í fjør, hevur hon skrivað sum free-lance fyri Sosialin og gjørt sendingar á Rás2.

## Petur J. Sigvardsen frá sum formaður



Eftir at hava sitið sum formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd í 10 ár fór Petur Jacob Sigvardsen í Havn frá á ársaðalfundinum mikudagin 23. apríl. Petur Jacob er føddur 13. september í 1932 við Gjógv, sonur Elisabeth, f. Joensen, og Karl Jacob Sigvardsen, bæði frá Gjógv. Hann er giftur við Jacobinu, f. Petersen, úr Sandavági. Hann tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1956 og var lærari í Mykinesi frá 1956-57. Frá 1957-58 var hann lærari í Miðvági og frá 1959 sum lærari við Miðvágs/Sandadvágs Skúla. 1. august í 1973 bleiv hann settur í starv sum skúlaráðgevi, og 1. desember 1979 varð hann settur sum deildarleiðari í Landsskúlafyrisitinginí. Hann fór úr hesum starvi 1. august 1997. Petur Jacob var næstformaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd frá 1977 og formaður síðan 1993. Hann hevur týtt fleiri bøkur og yrkt og týtt fleiri sálmar og sangir. Hann hevur m.a. skrivað bøkurnar "Úr Gjáar søgu".

## Nøvn í vikuni

### Kennir tú onkran …



Kennir tú onkran í familjuni,
á arbeiðsplássinum, í grannalagnum
ella hvar tað skal vera, ið hevur ein
merkisdag sum t.d. rundan
føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag
ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv
ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:..........................................................................................
Bústaður:.....................................................................................
Bygd/býur:..........................................................Tel:...................................
Evt. arbeiðspláss:........................................................................

Merkisdagurin er: ........................................................................

Innsendari: ..................................................................Tel:.............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo

## Eg elski ælabogan

*"Eg elski ælabogan"*
*segði abbasonurin.*
*"Hvat sigur tú" ?*
*"Eg elski ælabogan"*
*Vit vóru biltúr báðir.*
*Tað hevði regna,*
*og so komu sólin og ælabogin.*
*Og eg vísti honum á ælabogan.*
*Tá lat í Olaf:*
*"Eg elski ælabogan"*
*"Hví"?*
*"tí hann er so vakur – og eg elski alt sum er vakurt"*

**Jógvan E. Ósá**

## Dagurin

25. apríl. **Flaggdagur** Føroya. Tað var tann 25. apríl í 1940, at studentaflaggið Merkið varð viðurkent sum Føroya tjóðareyðkenni. Tað gamla navnið á degnum er **markusarmessa**, til minnis um evangelistin Markus. Týdningurin av navninum er óvissur.